

## Kaupþing er stórt

Íslendska felagið Kaupþing telist millum tey stóru feløgini í heiminum. Sambært einum nýggjum yvirliti hjá búskaparritinum Forbes er Kaupþing nummar 593 á listanum yvir heimsins størstu feløg. Tað merkir millum annað, at íslendska felagið er størri enn eitt nú so kend nøvn sum Mazda og Motorola. Heimsins størsta felag er amerikanski HSBC-bankin, og næst honum koma General Electric, Bank of America, JP Morgan og Exxon Mobil.

*Hreiðar Már Sigurðsson er forstjóri í Kaupþing (Mynd: Vísir)*

# Smyril Line skiftir út í nevndini

**Aðalfundurin hjá Smyril Line var hildin í gjár á Hotel Føroyum. 2007 gav eitt lítið avlop, men mest merkisvert var, at hetleldski nevndarlimurin ikki bleiv afturvaldur**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Mest umrødda málið á aðalfundinum hjá Smyril Line var valið av nevnd.

Tað hevði framan undan ljóðað, at hetlendski limurin í nevndini ikki fór at verða afturvaldur, og tað vísti seg eisini, at tá aðalfundurin – sum ikki var opin fyri fjølmiðlum – var av, sat Bobby Hunter ikki meiri í nevndini fyri Smyril Line.

Framtaksgrunnurin og FT Holding eiga 51% av partapeninginum og harvið meirilutan, og kunnu tí gera av, hvør situr í evndinii hjá Smyril Line.

Í nevndina fyri Bobby Hunter varð valdur Erik Østergaard úr Danmark, meðan Kurt Skov, sum er stjóri og eigari av Smyril Blue Water, kom í nevndina aftrat. Samtykt var nevniliga at víðka nevndina úr fýra upp í fimm limir.

Umboðið fyri Shetland Development Trust royndi at varðveita sín lim í nevndini við at skjóta upp eina víðkan av nevndini úr fýra upp í seks limir, men hetta uppskotið vann ikki frama. Lógir felagsins heimila annars heilt upp í sjey nevndarlimir.

Annars var sum vanligt roknskapurin hjá felagnum lagdur fram, og eftir at felagið hevur havt stór hall í árunum frá 2003 til 2005, vendi gongdin í 2006 til eitt lítið yvirskot upp á 1,6 milliónir. Roknskapurin fyri árið í fjør vísir eitt avlop á 2,1



*Nýggja nevndin í Smyril Lime er frá vinstru: Erik Østergaard, Hákun Djurhuus, formaður, Jónas Halgrimsson, Wilhelm Petersen og Kurt Skov*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

millión krónur.

So hóast sigast kann, at tað gongur rætta vegin, so er leiðslan ikki nøgd við úrslitið. Smyril Line sigur í einum tíðindaskrivi, at sera ringt veður í fjør heyst og meginpartin av vetrinum, saman við tøknifrøðiligum trupulleikum, førdi við sær, at tænastustøðið hjá felagnum mótvegis ferðafólki og farmakundum als ikki hevur verið nøktandi.

### Hákun heldur fram

Nettosølan vaks annars við 11 milliónum, úr 209 upp í 220 milliónir krónur. Hesin vøkstur stavar frá øktari ferðaseðlasølu – 8 milliónir – og øktari umborð-sølu á tvær milliónir. Inntøkurnar av farmaflutningi lógu á nøkurlunda sama støði sum árið framman undan.

Felagið framdi eisini í árinum eina umfígging, sum millum annað fevndi um eina hækkan av partapeninginum. Hann varð øktur úr 178 milliónum upp í 225 milliðonir krónur.

Samlaða skuldin hjá felagnum lækkaði úr 553 milliónum niður í 547 milliónir krónur í fjør.

Men sambært nevndini er hetta tó ikki nøktandi. Av omanfyri nevndu orsøkum og hækkandi oljuprísum gjørdist úrslitið áðrenn rentur og avdrag ikki eins gott og roknað varð við. Orsøkin til, at úrslitið hóast alt gjørdist eitt avlop í roknskapinum, er ein uppskriving av partabrøvunum, sum Smyril Line hevur í einum øðrum felag, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Sum nevnt omanfyri varð skift nakað út í nevndini, og umframt teir báðar nýggju nevndarlimirnar sita Hákun Djurhuus, Wilhelm Petersen og Jónas Halgrímsson eisini í nevndini.

Aftaná aðalfundin skipaði nevndin seg, og Hákun Djurhuus – sum kom í nevndina, tá verandi formaður, Andras Róin tók við sum stjóri í oktober í fjør – heldur fram sum formaður.



*Hákun Djurhuus takkar her Robert Walther Hunter, vanliga nevndur Bobby, fyri tíðina hann hevur sitið í nevndini í Smyril Line. Saman hava teir tó bert sitið í nevndini í fáar mánaðir, tí Hákun Djurhuus kom ikki í nevndina fyrr enn í oktober í fjør*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Skulu finna besta set-up'ið

**Vit eru ikki nøgdir við úrslitið í fjør, men vit arbeiða í løtuni við, hvussu vit skipa raksturin á besta hátt, sigur Hákun Djurhuus, afturvaldur nevndarformaður**

AÐALFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Smyril Line sigur í tíðindaskrivi, at leiðslan ikki er nøgd við úrslitið hjá felagnum í fjør. Tað er serliga ringa veðrið í vetur og trupulleikar við fyrst og fremst stabilisatorunum, sum hava viðvirkað til laka úrslitið.

- Tað er serliga um veturin, at vit hava trupulleikar. Inntøkugrundarlagið er veikt, og tí mugu vit hyggja upp á alternativir, men tað er ikki nøkur løtt uppgáva, sigur Hákun Djurhuus, sum varð afturvaldur til nevndarformann á aðalfundinum í gjár.

Ein annar stórur trupulleiki, sum hevur verið til miklan bága hjá teimum ferðandi, eru illa virkandi stabilisatorarnir.

- Ja, vit gleða okkum veruliga, til teir verða umvældir einaferð í oktober, sigur Hákun Djurhuus.

Hann viðgongur, at tað er ikki nøkur løtt uppgáva at reka eitt felag, har fyritreytirnar broytast so at siga alla tíðina.

- Oljuprísirnir eru farnir til Himmals, síðani nýggja Norröna kom. Bara í ár hava oljuprísirnir ávirkað rakstrargrundarlagið almikið, vísir fyrrverandi Shellstjórin á.

Hann heldur tí, at tað ræður um at fáa økt um inntøkurnar, samstundis sum stýr verður hildið á útreiðslunum.

- Vit hava í veruleikanum tríggjar vertíðir. Fyrst og fremst summarið, tá inntjeningin er hin nógv størsta, og tí mugu vit útnytta hesa vertíðina sum best og finna útav, hvussu vit kunnu leingja hana, sigur Hákun Djurhuus.

Í øðrum lagi er talan um eina vertíð áðrenn og aftaná summarið, og í triðja lagi veturin, sum er fíggjarliga tyngsta árstíðin.

- Vit arbeiða generelt fram ímóti at finna besta set-up'ið fyri okkara høvuðsinntøkur, sum eru ferðafólk og farmur, og hvussu vit á besta hátt fáa hesi at sampakka, sigur Hákun Djurhuus, nevndarformaður í Smyril Line.